Sjeikurin tók seg av døgum:

# Tað var ringt at fara út aftur

– Sorgin og allar kenslurnar vóru øgiliga torfør at liva við í fyrstuni, men tað ringasta fyri meg var tó at fara út aftur ímillum fólk, sigur 20 ára gamla Erla Petersen úr Fuglafirði. Sjeikur hennara tók lívið av sær í februar mánaði í fjør



SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@mail.djh.dk*

19 ára gamla Erla situr í kamarinum hjá sær í kjallaranum heima hjá foreldrunum. Hon fæst við eitt hvørt á telduni. Tað er fríggjadagur, og hon hevur verið til hálvársroynd í skúlanum og er bara glað fyri, at vikuskiftið stendur fyri durum. Klokkan nærkast tíggju á kvøldi, og Erla fær ikki fatur á sjeikinum hjá sær. Hon hevur ringt til hansara fleiri ferðir gjøgnum dagin. Eisini sent sms boð. Men onki svar. Hon er eitt sindur ørkymlað, tí hon plagar sum oftast at kunna fáa fatur á honum.

"Hann man arbeiða yvir í kvøld," uggar hon seg sjálva.

Uppi í køkinum situr pápi Erlu, tá telefonin ringir. Tað er løgreglan, sum spyr, um Erla er inni. Tað er hon, sigur pápin, og løgreglumaðurin biður pápan halda Erlu innandura, tí Per, sjeikurin hjá henni, hevur tikið seg av døgum.

Per tók lívið av sær heima hjá sær sjálvum fríggjadagin tann 11. februar í fjør. Hann varð funnin um 19 tíðina, og Erla fekk boðini tríggjar tímar seinni. Inni í húsunum hjá Peri fann løgreglan eitt bræv á telduni, sum Per hevði skrivað um 13 tíðina sama dag. Hetta brævið las systir Per fyri Erlu. Har fekk hon at vita, hví Per hevði valt at taka sítt lív.

– Beint tá hataði eg hann, og eg helt, at tað var so ljótt av honum. Men eg skilti avgerðina hjá honum hóast alt. Eg veit, at hann hevði nógvar og tungar trupulleikar at dragast við, men eg helt, at hann var ræðuliga sjálvsøkin at taka lívið av sær uttan at hugsa um, hvat vit avvarðandi standa eftir við, sigur Erla, sum tó ikki leið av tungari skuldarkenslu.

Hon visti, at tað ikki var orsakað av sær, at Per hevði valt at taka sítt lív, men í hennara verð var spurningurin meira, hvat øll onnur fóru at halda.

– Eg tordi øgiliga illa útaftur, tí eg var sannførd um, at øll onnur fóru at halda, at tað var mín skuld. At eg var orsøkin til, at Per gjørdi tað, greiðir Erla frá.

### Kaldur og ólekkur

Erla sá ikki Per, fyrr enn hon skuldi siga farvæl við hann á kapellinum. Saman við familju og avvarðandi fór hon á kapellið at síggja Per, áðrenn lokið varð lagt á kistuna. Hon bleiv rættiliga kløkk, tá hon sá hann. Hann líktist als ikki sær sjálvum. Var gráur í andlitinum og hárið lá øðrvísi enn vanligt.

– Eg vildi ikki nema við hann, tí hann var so kaldur og ja....ólekkur. Soleiðis vildi eg ikki minnast hann, greiðir Erla álvarsom frá.

Hon hevði ilt við at standa inni í kapellinum og hevði allatíðina hug at fara út. Men hon varð verandi, og so við og við gekk ræðuligi veruleikin upp fyri henni. At Per var burtur, og at hann hevði sjálvur gjørt tað og tikið avgerðina um tað.

– Eg ivaðist longi, um eg skuldi fara á kapellið. Men eg valdi at gera tað, tí so sá eg við mínum egnu eygum, at hann veruliga var deyður, sigur Erla, sum gekk saman við Per í góð trý ár.

### Knúturin loysnaði

Per fór til gravar sætta dagin eftir. Allar dagarnar gekk Erla mest sum fyri seg sjálva við kenslunum og tonkunum. Hon tosaði ikki við nakran og græt millum lítið og onki. Undir jarðarferðini sang Essa Jacobsen. Erla minnist ikki, hvør sangurin var, men tá hendi nakað. Kenslurnar tóku yvir, og loksins fór hon at gráta.

– Eg tútbrølaði. Bæði hart og longi. Alt skuldi bara út, og eg hevði ilt við at steðga aftur, greiðir hon frá.

Hon hevði gingið einsamøll við øllum tonkunum og kenslunum alla vikuna, og nú var ovboðið.

Mamma hennara sat hjá henni. Hon græt eisini og bað Erlu halda fram við at gráta, tí hon ikki hevði grátið ordiliga, síðani tey fingu deyðsboðini. Tað var ein lætti fyri Erlu at fáa sett hol á kenslurnar.

Tá kistan skuldi út úr kirkjuni, var hon sissað nakað, og tað var gott at fáa fríska luft. Eftir jarðarferðina var ervi, og síðani fór Erla heim til beiggja Per, har øll familjan hjá honum var savnað, áðrenn hon fór heim til sína egnu familju.

Hóast hon als ikki føldi, at hon kundi loyva sær at fara út, fór hon heim til eina vinkonu seinni tað kvøldið. Hon vildi ikki sita einsamøll.

– Tað ringasta er at sita einsamøll heima við øllum tonkunum.

» *Beint tá hataði eg hann, og eg helt, at tað var so ljótt av honum*

» *Eg tordi øgiliga illa útaftur, tí eg var sannførd um, at øll fóru at halda, at eg var orsøkin til, at Per gjørdi tað*